# Kjak



Kitty May Ellefsen
*Løgtingskvinna fyri Fólkaflokkin*

# Tá fjøldin rópar – Brenn heksina á báli!

**Grannskoðaramálið**
Í túsundatali av menniskjum vórðu í miðøldini og eftir trúbóðtina brend á báli sum heksir. Kirkjan gekk á odda í hesari herferð, sum serliga var vend móti kvinnum. Prestur ákærdi kvinnuna fyri at vera heks, hereftir varð hon handað til dómstólarnar. Rættarsakin kundi vara í fleiri dagar, har kvinnan varð so pínd og troytt at hon til seinast játtaði seg seka. Eftir hetta varð kvinnan brend livandi á báli, meðan mannamúgvan geylandi og rópandi hugdi at.

Soleiðis var fyri 500 árum síðani, tá heksirnar vórðu brendar, og soleiðis var fyri 2010 árum síðani tá mannamúgvan rópti – krossfest, krossfest.

**Føroyar ídag**
Í dag liva vit í rættarsamfelagnum Føroyum. Vit liva í 2010 í einum nýmótans samfelag. Um tú spyr føroyingar flest, so kennir eingin seg aftur í heksabrenning ella krossfesting. Nei, vit liva í einum frælsum samfelag, har øll hava síni rættindi, har tali- og skrivifrælsi valdar, har fjølmiðlarnir eru óheftir, og har tey ákærdu hava rætt til forsvar og verju.

Tó hava hesar seinastu vikurnar ikki mint sørt um heksabrenningina í miðøldini tá prestur ákærdi, og einki menniskja kundi seta spurnartekin við hansara ákæru.

Í grannskoðaramálinum hevur Løgtingssins Umboðsmaður talað, og hennara talu kann eingin seta spurnartekin við. Eins og í miðøldini, so er alt uppi á gosi. Mannamúgvur, politikkarar og fjølmiðlar rópa hvørt um annað **– tendra bál, tendra bál.** Og stakkals heksirnar, sum skulu brennast hava ongan livandi møguleika fyri at verja seg móti álopum.

**Grannskoðaramálið**
Í miðøldini tá kirkjurnar í øllum Europa fóru at jagstra heksir var orsøkin manglandi makt yvir fólkinum. Vit heksabrenning staðfesti kirkjan yvir fyri fólkinum, at um tey ikki hildu seg til kirkjuna so vórðu tey brend á báli. Hetta legði sjálvsagt band á fólk soleiðis, at tey av ræslu hildu seg til kirkjuna.

Spurningurin er so hvat veruligi essensurin í hesum málinum er?

Er veruliga orsøkin fyri, at politikkarar og fjølmiðlar vilja síggja heksabrenningar í grannskoðaramálinum kanska tann, at man vil flyta fokus frá substansinum í málinum? Nemliga, at vit enn einaferð hava yvirtikið eitt stórt málsøki eftir donskum leisti, sum vit ongan livandi møguleika hava fyri at umsita sjálvi?

Halda politikkarar og fjølmiðlar, at vit í Føroyum við at brenna eina ella tvær heksir í hesum máli kunnu halda fram í sama lag? Yvirtaka rátt uttan at seta spurnartekin við um danska skipanin yvirhøvur kann nýtast í Føroyum?

### Hvar var nú veruligi trupulleikin í heksa málinum?

Hurra fyri yvirtøkur og Hurra fyri at vit einaferð verða eitt sjálvbjargið fólk, sum sjálvi ráða í Føroyum. – Alt gott um tað –

Men, høvdu vit bara kunna sannað, at donsku skipaninar, sum vit yvirtaka ikki altíð hóska til okkara samfelag. So høvdu vit verið komin nógv longur.

Grannkoðaraøkið hevur verið føroyskt í eitt mannaminni. Tá danir endurskaptu álitið á føroysku umsitingina við at innføra danskar reglur og skipanir í 1994 var grannskoðaralóggávan dagførd. Fyri at gerast løggildugur grannskoðari skuldi ein eftir lógini uppfylla 6 treytir. Herundir er ein av treytinum, at umsøkjarin skal hava staðið eina serliga próvtøku sambært § 4.

Í § 4 stendur, at tann føroyski skrásetingarmyndugleikin ásetir nærri reglur um próvtøkuna.

Og sjálvt um talan er um yvirtikið málsøki, og vit í Føroyum skulu hava føroyskar grannskoðarar, herundir at føroyski myndugleikin hevur skyldu til at gera nærri reglur viðvíkjandi próvtøku hjá grannskoðarum og eisini halda próvtøku fyri grannskoðarum so er ein

**– ordiligur grannskoðari enn ídag ein stats aut grannskoðari - stoyptur og doyptur í Danmark.**

Hetta sjálvt um tað ongastaðni í lógini stendur, at próvtøkan skal vera donsk ella eftir donskum leisti. Tvørturímóti so leggur lógin upp til, at vit í Føroyum skulu hava føroyskar grannskoðarar – stoyptar og doyptar í Føroyum.

Og tá nú umboðsmaðurin sigur, at brek og feilir eru við skipanini, so er eingin, sum klárar at lyfta seg upp um bjarta ljósið frá bálinum, sum so lokkandi fær okkum at gleðast til heksabrennin.

Tað er eingin sum setur spurnartekin við, um okkara danska eftirlíkningsskipan yvirhøvur er tann rætta skipanin. Kanska skuldu vit heldur valt at hugt eftir øðrum skipanum ella sum lógin leggur upp til – gjørt okkara egnu skipan.

**Niðurstøðan**
Hetta málið er bara eitt av mongum málum, sum fara at stinga seg upp, so hvørt sum vit blint yvirtaka danskar skipanir, sum eru skraddaraseymaðar til eitt heilt annað fólk enn okkara.

Ja, well – Vit kunnu velja at brenna heksir, hvørja ferð føroyska samfelagið brennir seg av hesum skeiva leisti. Men hetta kemur ikki at gagna næsta ættarliðnum.

---

Sigurjón Thordarson, lívfrøðingur
*Formaður Íslendska Frælsisfloksins*

# Eitt stríð bygt á reint tvætl frá ICES

Tann nógv ávirkandi konservativi ES tinglimurin Struan Stevenson úr Bretlandi hevur vunnið sær gott orð fyri at verja borg vegna fiskivinnuna og bretskar fiskimenn. Sum partur av sínum stuðli til bretskar fiskimenn hevur hann stríðst eitt hart stríð ímóti at loyva Íslandi og okkara grannum í Føroyum at troyta teir makrelstovnar sum finnast í okkara sjóøkjum í veldigum mongdum.

Struan Stevenson byggir síni argument heilt og eina á ICES ráðgeving. Bretskir fiskimenn áttu at vitað betur enn nakar annar at ICES ráðgeving er ikki verd nógv, serliga av tí at hon brýtur við allar góðkendar vistfrøðiligar meginreglur.

Tað er láturligt av ICES at viðgera hvørt fiskaslag sum eina eind fyri seg, sum um at hvørt fiskaslag livir eitt lív í egnari verð ið hóskar smidliga inn í eitt Excel rokniark, uttan at atlit yvirhøvur verða tikin til at hvørt fiskaslag kappast við onnur fiskasløg antin um føði ella sum føði fyri onnur fiskasløg.

ICES ráðgeving er bygd á ta dogmu at vit mugu veiði minni fyri at kunna veiða meira seinni. Trupulleikin er at 'seinni' kemur ongantíð, og mýtan um ovurveiði verður blást upp í takt við at fiskiflotarnir gerast minni.

Tað átti at verið púra greitt fyri ein og hvønn hugsandi fiskimann at ICES ráðgeving um troyting av uppisjóvar fiskasløgum í Norður Atlantinum er fullkomiliga skeiv.

Hesi seinnu árini hava ICES tilmælini viðvíkjandi veiði av lodnu, svartkjafti og norðhavssild verið fylgd. Allir hesir stovnar ið hava verið fiskaðir samsvarandi ráðgevingina eru nú í einum lágpunkti.

Hinvegin vísir makrelurin ein veldigan vøkstur, uttan mun til at hann hevur verið fiskaður nógv meira enn hvat ið ICES hevur mælt til. Hetta sigur okkum alt okkum tørvar at vita um hvussu álítandi tær mannagongdir eru sum ICES nýtir.

Stovnsmetingar mannagongdirnar ið fiskivinnu myndugleikar ganga eftir eru sum heild merktar av stórum óvissum, herundir trupulleikar at áseta eina sanna mynd av natúrligari deyðiligheit. Hetta merkir at stórir spurningar áttu at verðið reistir um gildið í úrslitum av stovnsmetingum.

Í veruleikanum eru metingar av makreli enn minni eftirfarandi enn metingar av øðrum fiskasløgum av tí at hann hevur ongan sundmaga og er tískil sera torførur at lokalisera við hjálp av akustiskum mannagongdum.

Stovnsmetingar av makreli eru fyri stóran part bygdar á ivasamar kanningar av gýtingarstovninum, gjørdar við støði í einari rannsókn triðja hvørt ár fyri at áseta nøgdina av makrelrognum sum sveima í sjónum.

Um Struan Stevenson vil síggja verulig framstig vegna skotskar fiskimenn, so hevði tað verið snildari fyri hann at kravt eitt grundigt eftirlit av ICES tilmælum — og givist, um ikki annað so fyri tíðina, við hesum stríði ið er bygt á reint tvætl frá ICES.